# Savnað inntøkur í búskapargrunn



*Eftir norskari fyrimynd skal ein føroyskur búskapargrunnur skipast.*

**Stendur tað til Tjóðveldisflokkin verður ein búskapargrunnur skipaður, har blokkurin og kolvetnisinntøkur skulu goymast**

POLITIKKUR
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*

Eftir norskari fyrimynd hevur Tjóðveldisflokkurin lagt fram Uppskot til løgtingslóg um Búskapargrunn Føroya.

- Endamálið við Búskapargrunni Føroya er at tryggja samfelagsliga burðardygga nýtslu av serinntøkum landskassans, við atliti til núlivandi og komandi ættarlið. Hartil er endamálið við Búskapargrunni Føroya at virka sum eitt amboð til at røkka einum sjálvberandi búskapi, stendur at lesa í lógaruppskotinum.

Fríggjadagin verður fyrsta viðgerð av málinum á løgtingi, og málið verður beint í fíggjarnevndina.

- Ætlanin er, at allar óvanligar inntøkur hjá landskassanum ikki skulu merkja vanliga raksturin, sigur Páll á Reynatúgvu, tingmaður fyri Tjóðveldisflokkin.

Tað er ógvuliga sjáldsamt í føroyskum politikki, at ein andstøðuflokkur leggur fram eitt so umfatandi uppskot. Og Páll á Reynatúgvu sigur seg eisini sanna, at tað verður trupult at fáa uppskotið samtykt í verandi líki.

- Vit eru opnir fyri øllum møguleikum og til reiðar at kjakast um uppskotið, sigur Páll á Reynatúgvu.

Í skrivandi stund hevur samgongan ikki viðgjørt málið. Men tað hoyrir til teir heilt sjáldsamu løturnar í føroyskum politikki, at eitt uppskot - í øllum førum av tílíkum slag sum hesum - frá andstøðuni verður samtykt.

### Inntøkur

Í Búskapargrunn Føroya skulu: skattur sambært kolvetnisskattalógini, avgjøld og ágávur sambært løgtingslóg um kolvetnisvirksemi, blokkstuðulin, inntøkur frá einskiljingum og rentur og avkast av grunsfænum.

Tað vil siga, at allar inntøkur, sum ikki eru beinleiðis skatta, avgjalds ella tollinntøkur.

Uppskotið ger ikki viðmerkingar til, hvussu tað ávirkar tær næstu fíggjarlógirnar, og tað er eisini meiningin.

- Hetta er ætlað sum eitt seriøst uppskot um ein yvirskipaðan búskaparpolitikk. Eg ætli mær ikki niður í smálutir til hvørt punkt, sigur Páll á Reynatúgvu.

### Skiftisgjøld

Grunnurin skal virka frá 2006. Og ætlanin er, at skiftisgjøld skulu latast úr grunninum til landskassan frá 2006 til 2014. Í 2006 verður gjaldið 600 milliónir, og gjaldið minkar síðani 75 milliónir árliga til 2014. Peningurin úr grunninum skal nýtast til at gjalda skuld og til útbúgving og gransking. Heildarveitingin úr Danmark er í løtuni 615 milliónir.

Tá grunnurin eigur 3,5 milliardir skal uppskot gerast um realavkast frá grunninum.

### Kalda móttøku

Tað verður mestur heldur ikki hesaferð, at eitt andstøðuuppskot av hesum slag verður samtykt í løgtinginum. Í øllum førum ikki í tí líki, sum Tjóðveldisflokkurin hevur skotið upp

Bárður Nielsen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, sigur, at málið hevur ikki verið fyri í samgonguni, men hann er sjálvur ikki so heitur fyri uppskotinum.

- Har er ymiskt, sum eg ikki kann taka undir við, og ymiskt, ið eg taki undir við. Eg haldi, at uppskotið sigur ov lítið um, hvørjar tænastur skulu skerjast, tá vit í 2007 fáa 75 millliónir minni útgoldið til rakstur, sigur Bárður Nielsen.

Málið um búskapargrunn er ikki ókent í føroyskum politikki. Tá Karsten Hansen var landsstýrismaður í fíggjarmálum var málið eisini frammi, men tað eydnaðist ikki Fólkaflokkinum og Tjóðveldisflokkinum at semjast. Men bæði Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin vóru sinnaðir at taka undir við einari skipan, ið av álvara minnir hetta. Málið kom tó ongantíð fyri løgtingið.

- Eg kann í prinsippinum taka undir við at skipa ein búskapargrunn. Serliga til oljuinntøkur hava royndir í øðrum londum víst, at tað er tað einasta rætta, sigur Bárður Nielsen.

## Vistu hvørjum teir leitaðu eftir



*Vestmanna Fiskavirking gjørdist 2.000 fátækari av innbrotstjóvum*

**Innbrotstjóvar fingu ikki pengaskápið upp, men funnu eitt sindur av pengum á Fiskavirking í Vestmanna**

INNBROT
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*

Tá arbeiðsfólk á Fiskavirking í Vestmanna mikumorgunin komu til arbeiðis, so nýttust teimum ikki lykil til skrivstovuna, tí hurðin stóð opin inn á skrivstovuna.

Hesum høvdu innbrotstjóvar syrgt fyri, tá teir brutu hurðina upp.

Tjóvarnir høvdu stjolið eitt sindur av peningi á skrivstovuni, men pengaskápið dugdu tjóvarnir ikki at lata upp.

Hinvegin dugdu teir at finna lykilin til kantinuna, har eitt sindur meira av peningi var.

- Tað kundi bent á, at tjóvarnir vistu, hvat teir leitaðu eftir, sigur Julian Olsen á Vestmanna Fiskavirking.

Tað var tó ikki tað heilt nógva av peningi, ið tjóvarnir fingu fyri ómakin. Einar 2.000 krónur fingu tjóvarnir við sær. Tað er tó ikki greitt, um talan var um ein tjóv ella fleiri tjóvar.

Annars er eingin nevniverdur skaði gjørdur, frættist út Vestmanna

Løgreglan í Vágum kannar í løtuni málið saman við kriminal løgregluni.

## Serliga treytir til fólk sunnanfjørðs

Samgongutingmaðurin Òli Breckmann spyr løgmann, hvat hann meinar um eina heldur serstaka ætlan viðvíkjandi Suðuroynni og Sandoynni. Ætlanin er, at stóru oyggjarnar sunnanfjørðs verða lýst sum serstakt búskaparligt vakstrar- og royndarøki. Landskassin yvirtekur alla kommunuskuld, so skjótt sum kommunurnar hava skipað seg í eina kommunala eind. Tá SEV og IRF verða einskild, rindar nýggja kommunueindin landskassanum sín part av sølupeninginum, og landskatturin verður í mesta lagi 20% í samanløgdu og skuldafríu kommununi.

Enn er ógreitt, nær fyrispurningurin verður svaraður. Løgtingið fer væntandi fríggjamorgunin at atkvøða fyri, at løgmaður skal svara fyrispurninginum.

*-HR*